# Kravdu vátan vøll

Dysturin millum HB og Elfsborg var søguligur, tí hetta var fyrsta ferðin, at føroyskt felag slapp at spæla altjóða dyst á grasliki. Elfsborg spæla eisini sjálvir á einum vølli - sum eisini er 4. ættarliðsgrasliki - á heimavølli í Borås. Kortini kravdi svenski hópurin, at ovari vøllur í Gundadali skuldi spulast, áðrenn teir fóru at venja á honum. Tórshavnar Sløkkilið var til dystin fús, og so vóru sviarnir væl nøgdir.



# Sigurin skuldi verið størri

Venjari og leikari úr Elfsborg mettu eftir dystin, at sigurin kundi verið væl størri móti HB. Gestirnir vunnu 4-1 í Gundadali seinnapartin. - Vit gjørdu ikki nógv av, men vit burdu fingið fleiri mál. Vit skapa eina rúgvu av møguleikum. Eg skuldi sjálvur verið komin á máltalvuna, men vit høvdu eisini aðrar møguleikar, sigur Stefan Ishizaki við heimasíðuna hjá Elfsborg. Magnus Haglund heldur, at teir hava tryggjað sær víðari luttøku í kappingini. - Seinni hálvleikur var betri, og vit kundu fingið fleiri mál. Fýra mál á útivølli í Intertoto taka vit við, og vit kunnu so smátt byrja at fyrireika okkum til dystirnar móti Hibernians í øðrum umfari, sigur Magnus Haglund.



*Málið er púrasta greitt at fáa gull, og gongst væl í hesum afturvísur Peter Foldgast als ikki, at hann kanska heldur fram hjá EB/Streymi*

*Mynd: Polfoto*

## Viðmerkingar frá bold.dk:

*Godt at se der kommer skub i hans karriere – he he*

*Den mands karriere har ikki været andet, end en stor nedtur! Det ender nok med at han spiller Seriefodbold om et års tid.*

*Endnu et eksempel på at Superligaen ikke kan holde på stjernerne! De er sgu for pengestærke de færinger!*

*Det er sygt det der. Utroligt at det ikke kan række til mere. Pinligt af Foldgast.*

*Det passer vist meget fint til hans niveau.*

*Hæ hæ, der er da langt fra Australien til Færøerne, men udenlands kom du da, selv om de er en del af rigsfællesskabet.*

*Skræpekød, spæk og dejlige uldsokker??*

longri, meintu tey flestu. Hann var illa darvaður av skaðum, og hann fekk ongantíð prógva seg í Týsklandi. Danin steðgaði heldur ikki leingi á, tí longu árið eftir var hann í Århus og AGF. Har hevur Foldgast verið sáttmálabundin seinastu trý árini. Í 2006 var hann millum lyklaleikararnar, tá felagið vann sær uppflyting í bestu donsku deildina.

Fyri seks árum síðan var ógjørligt at hugsa sær, at Peter Foldgast skuldi spæla í føroysku Formuladeildini. Hann er hinvegin væl nøgdur við sína yrkisleið.

- Skaðar hava havt sítt at týða, men eg iðri meg ikki. Eg havi spælt fleiri stórar dystir við nógvum áskoðarum, og tað er ein ótrúlig kensla. Eg havi umboðað Brøndby og AGF, og tað er eg sera errin av, sigur 28 ára gamli Peter Foldgast.

HB-Elfsborg 1-4 (1-2):

# Klassamunur



HB var støðugt aftaná Elfsborg, sum vann ein greiðan og uppibornan sigur í Gundadali

*Mynd: Álvur*

**Eitt HB-lið, sum í løtuni ikki ríður á aldukambinum, hevði lítið og einki at gera móti svenska Elfsborg, sum uttan stórvegis hóvasták koyrdi sigurin heim**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var langt millum góðu løturnar hjá HB, tá teir í gjár spældu dyst í Intertoto-kappingini móti svenska Elfsborg.

Á pappírinum er eitt lið úr bestu svensku deildini ein dekan ov stórur biti hjá einum og hvørjum føroyskum liði. Tí skuldi HB veruliga raka dagin, um nakar hugsingur skuldi vera um at skapa spenning um samlaða úrslitið av dystinum.

Men tað var nú ikki leingi, at tann vónin livdi í HB-leguni. Dysturin var bert fáar minuttir gamal, tá Elfsborg kundi gera sær dælt av vánaligum markeringum í HB-verjuni. Ein støða, sum væl og virðiliga lýsti, hvussu lítið klárir havnarmenninir vóru til dystin.

At Christian Høgni fekk áskoðararnar upp frá eina løtu, tá hann sera hegnisliga kíndi bóltinum upp í handara málhorn, munaði ikki tað heilt stóra, og heldur ikki eftir hetta líktist HB nøkrum sannlíkum vinnara av dystinum.

HB-verjan varð støðugt tagað sundur av skjótt spælandi sviunum, og tað var ikki óvæntað, tá ein púrasta leysur Daniel Mobaeck kundi skora til 2-1.

Og so var ikki stórt meira at skriva heim um. Seinnu trý korterini vóru í stóran mun avgreiðsluspurningur, og ofta hevði tú varhugan av, at Elfsborg heldur vildi flyta bóltin runt enn at skjóta. Tvær ferðir varð leiðslan tó økt. Fyrru ferðina eftir verjumistak í uppspælinum, og seinnu ferðina var talan enn eina ferð um vánaliga markering við

## FAKTA um dystin

**HB-Elfsborg 1-4 (1-2):**
**0-1:** Elmin Kurbegovic, 12.
**1-1:** Christian Høgni Jacobsen, 17
**1-2:** Daniel Mobaeck, 26.
**1-3:** Joakom Sjøhage, 50.
**1-4:** Daniel Mobaeck, 55.
**HB:** Tróndur Vatnhamar - Pætur Jørgensen, Fróði Benjaminsen, Vagnur Mohr Mortensen, Poul Thomas Dam (Rasmus Nolsøe, 62.) - Páll Mohr Joensen, Kári Nielsen, Ólavur í Ólavsstovu (Milan Kuljic, 46.), Christian Høgni Jacobsen - Andrew av Fløtum, Jákup á Borg (Røgvi Poulsen, 72.)
**Elfsborg:** Abbas Hassan – Floren Mattias, Johan Karlsson, Helgi Danielsson, Daniel Mobaeck, Joakim Sjøhage, Teddy Lukic, Emir Bajrami, Andreas Augustinussen, Stefan Ishizaki, Elmin Kurbegovic

## Ov stóra virðing

Tróndur Vatnhamar, sum fýra ferðir noyddist í HB-málið eftir bóltinum, helt ikki, at svenska Elsfsborg var somikið nógv betri enn HB, sum tølini siga.

- Eg haldi ikki, at teir vóru so góðir, sum vit bóru ótta fyri. Sjálvandi er hatta eitt sterkt lið, men ikki fýra ferðir betri enn vit.

Men tit eru ógvuliga lítið við í dystinum. Høvdu tit ov stóra virðing fyri teimum?

- Ja. Tað haldi eg. Vit tora ikki at spæla, og so gera vit eisini fleiri mistøk. Eitt nú vistu vit, at teir eru sera vandamiklir við deyðbóltar, men kortini sleppa teir tvær ferðir at skora eftir slíkar, og tað er ikki nóg gott.

Mikukvøldið spælir HB móti Skála, áðrenn teir hósdagin leggja leiðina til Svøríkis. Ein ferð, sum nú ikki sær heilt so spennandi út.

- Nei, tað ger hon kanska ikki. Men vit skulu so yvir, og so mugu vit bara taka tað sum eina uppliving, heldur Tródur Vatnhamar.

**-mørk**